*Nú verður ein triðingur av Atlantic Airways einskilt, og samstundis verður føroyska flogfelagið skrásett á virðisbrævamarknaði*
*Savnsmynd*



# Atlantsflog lýst til sølu

**Í næstu viku kunnu allir føroyingar og útlendingar keypa partabrøv í føroyska flogfelagnum Atlantic Airways, tí tá selur Føroya Landsstýri ein triðing av sínum partabrøvum. Spell, at vit ikki tóku stigið og seldu tveir triðingar beinanvegin, heldur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum**

EINSKILJING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Tað var ikki við góða viljanum hjá landsstýrismanninum í vinnumálum, Bjarna Djurholm, at bert ein triðingur verður seldur av Atlantsflog. Í eini viðmerking til Rás 2 í dag sigur Bjarni Djurholm, at prísrurin fyri felagið ivaleyst hevði verið betri, um gjørt var á sama hátt sum við Føroya Banka at selja tveir triðingar.

- Uppleggingð hjá okkum var at selja tveir triðingar beinanvegin, men ein løgtingsmeiriluti vildi tað øðrvísi, og tí verður bert ein triðingur seldur nú, sigur Bjarni Djurholm.

Einskiljingin av Atlantsflog skuldi longu verið byrjað fyri einum ári síðani, men vanlukkan á Stord gjørdi ein sølu ómøgulga tá, vísir landsstýrismaðurin á.

Prospektið, ella søluskjalið, sum lýsir felagið, verður almannakunngjørtmikudagin 14. november í sambandi við, at Atlantic Airways verður lýst til sølu og skrásett á OMX, íslendska virðisbrævamarknaðinum. Sjálv sølan byrjar mánadagin 19. november.

Við hesum er einskiljingin av Atlantic Airways farin í gongd, og í hesum sambandi verður tíðindafundur í Vinnumálaráðnum hósdagin tann 15. november kl. 10. Sama dag verður kunnandi fundur fyri almenninginum klokkan 17 í Norðurlandahúsinum.

Vinnumálaráðið vísir á, at Atlantic Airways hevur ment seg nógv seinastu árini og er í dag eitt sterkt felag. Talið á fráferðum millum Føroya og útlond er fimmfaldað, síðani felagið fór undir flúgving millum Føroyar og Keypmannahavn í 1988. Felagið arbeiðir áhaldandi fyri at fjøltátta búskaparliga grundarlagið, og í 2006 stavaði meiri enn helmingurin av inntøkunum úr útlondum. Tilsamans flutti Atlantic Airways 351.000 ferðafólk í fjør.

Umsetningurin í 2006 var 519 mió. kr. og 30 juni 2007 var eginpeningurin 208 mió. kr.

Tá starvaðust um 200 fólk í felagnum, sum flýgur við seks flogførum og trimum tyrlum.

Kaupthing Bank hevur fyrireikað arbeiðið at skráseta Atlantsflog á virðisbrævamarknaðinum og stendur eisini fyri søluni, sum fer fram í tíðarskeiðinum 19. til 27. november.

www.havsbrun.fo



Er tín stórsta styrki

“Vanligt vit og skil…”

– so er tað kanska tær vit hava brúk fyri…

Havsbrún er eitt av stórstu og tøkniliga mest framkomnu framleiðsluvirkjunum í Føroyum við 90 starvsfólkum og einum umsetningi uppá smáar 600 mill. kr árliga. Havsbrún framleiðir fiskamjøl- og lýsi á Mjøldeildini, og alifóður á Fóðurdeildini.

Vit koma í nærmastu framtíð at hava brúk fyri framleiðslufólki, og vilja hervið eggja áhugaum at søkja.

**Arbeiðsuppgávur**
- Tá ið framleiðsla er at verða partur av dagliga arbeiðinum sum er í vaktum við skiftandi tíðum.
- Røkt, viðlíkahald og umvælingar av framleiðslustólum og virkinum annars.

**Vit rokna við at tú hevur**
- ein ávísan kunnleika til maskinur og teldur
- eldhuga, ert álítandi og ágrýtin

Lønina tosa vit um…

Vit kunnu bjóða eitt spennandi starv í einum tekniskt dynamiskum umhvørvi, har menningin gongur við rúkandi ferð.

Hevur hettar tín áhuga, so send eina umsókn so skjótt sum gjørligt. Tó seinast 30. novembur 2007. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Vilt tú vita meiri, ert tú vælkomin at ringja til Hartvig Joensen, deildarleiðara ella senda ein teldupost.

HAVSBRÚN

pf Havsbrún
FO-530 Fuglafjørður
Tlf 41 44 00
Fax 41 44 01
E-mail: haj@havsbrun.fo

